## Bókalán

Lítið bókasavn er í Virkisstovuni. Býarbókasavnið og starvsfólkið í Virkisstovuni, tryggja, at bøkur eru til taks, og sambært avtalu kunnu ávísar bøkur bíleggjast.

## Royking

Á Boðanesheiminum er eitt roykirúm á Strandarlon, har tygum sum búgvandi kann roykja.



# Vælkomin á Boðanesheimið



BOÐANESHEIMIÐ

Yviri við Strond 95
100 Tórshavn
Tlf. 302299

## Innihaldsyvirlit.

Inngangur ........................................................ s.3
Adressa og telefonnummur .................................. s.4
Boðanesheimið .................................................. s.5
Røkt og umsorgan .............................................. s.5
Innrættan/innflytan............................................. s.6
Heimavitjan ........................................................ s.9
Kontaktpersónskipan........................................... s.9
Reingerð ............................................................. s.9
Klædnavask ........................................................ s.9
Peningalig viðurskifti ........................................ s.10
Avvarðandi ......................................................... s.11
Læknaviðurskifti ................................................ s.11
Vitjan/gestir ....................................................... s.12
Virkisstova ......................................................... s.12
Hugnaløtur ......................................................... s.12
Sjálvboðin .......................................................... s.12
Ergoterapi /Fysioterapi...................................... s.13
Andalig tilboð .................................................... s.13
Køkurin veitir ..................................................... s.14
Føðingardagar .................................................... s.14
Hár-og fótarøkt.................................................. s.15
Egin telefon ........................................................ s.15
Útvarp og sjónvarp............................................. s.15
Postur og bløð .................................................... s.15
Bókalán ............................................................... s.16
Royking. .............................................................. s.16



Til stórar rundar føðingardagar ber til at læna Tórslon, til í mesta lagi 90 fólk.

## Hár- og fótarøkt

Hvørja viku kemur hárfríðkan á Boðanesheimið, og kann henda tænasta nýtast fyri egnan kostnað.
Somuleiðis kemur fótarøkt á Boðanesheimið eftir avtalu, og er gjørligt at taka av hesum tilboði fyri egnan kostnað.

## Egin Telefon

Tygum kunnu ikki flyta tygara egnu telefon við inn á heimið, men til ber at fáa egið telefonhald. Telefonin er fyri tygara egnu rokning

## Útvarp og sjónvarp

Eru til felags nýtslu í øllum eindum, men egið útvarps- og sjónvarpstól kunnu tygum eisini hava við, og rinda tygum tá kringvarpsgjald. Um tygum ynskja fleiri rásir enn KVF, mugu tygum sjálvi keypa móttakara og kort. Tygum rinda sjálvi fyri tann pakkan tygum velja.

## Postur og bløð

Tygara postur kemur á Boðanesheimið, tá flyting verður meldað til Posta.
Ein lítil kurv merkt “postur” er inni í búrúminum hjá tygum, soleiðis at tygum saman við tygara avvarðandi kunnu lesa og avgreiða postin.
Boðanesheimið heldur vanligu bløðini, og liggja tey frammi í seturstovunum

## Køkurin veitir

Køkurin syrgir fyri, at tygum fáa fjølbroyttan og nøktandi kost, sum fylgir almennu tilráðingunum. Eisini verður serkostur gjørdur í serligum førum.

Avvarðandi kunnu keypa mat í heiminum, tá skal bíleggjast frammanundan. Máltíðin verður tá etin í búrúminum saman við tygum. Av praktiskum ávum, kunnu bert 4 avvarðandi eta hjá tygum hvørja ferð.

Til gerandisdagar skal bíleggjast **dagin fyri áðrenn kl. 12.** Til vikuskiftið og høgtíðir **fríggjadag** ella **2 dagar frammanundan kl. 12.**

**Matprísir**

| | | |
|---|---|---|
| Døgurði gerandisdagar | kr. | 60 |
| Døgurði sunnudagar | kr. | 80 |
| Døgurði halgidagar | kr. | 100 |
| Nátturði | kr. | 50 |

## Føðingardagar

Føðingardagar hjá tygum verða hildnir á eindini uml. kl. 15 saman við húsfeløgum og starvsfólki við drekkamunni. Køkurin letur lagkøku.

Ynskja tygum harumframt at halda egið føðingardagshald, má hetta vera í egnum búrúmi, tygum og avvarðandi sjálvi gera klárt og rudda av. Køkurin letur eina lagkøku til hetta.

Eisini stendur í boði at læna fundarhølið, sum er til 12-14 fólk. Tá skulu tygum vikuna fyri gera avtalu við deildarleiðaran og fáa vegleiðing í hesum sambandi. Føðingardagshaldið er tá tygara egna. Hølið skal verða handað aftur í sama standi, sum undan veitsluhaldinum.

## Inngangur

Við hesum bóklingi bjóða vit tygum

# Vælkomin á Boðanesheimið

**Bóklingurin inniheldur hentar upplýsingar um heimið.**

Greitt verður frá innrættan, innflytan, broyting í peningaviðurskiftum í samband við innflytan, og greitt verður frá tilboðum, tiltøkum og mongum øðrum.

Eru ivamál, eru tygum ella avvarðandi vælkomin at tosa við deildarleiðaran ella onnur starvsfólk á heiminum.

Tá tygum fyrstu ferð koma á Boðanesheimið, er alt óivað villingarsamt og fremmant, men vit vóna, at hesin bóklingur hjálpir tygum til nakað skjótari at kenna tygum heima á Boðanesheiminum.

Við hesari heilsan vil starvsfólkið gera sítt til, at hetta skal eydnast og ynskir tygum og tygara avvarðandi vælkomnum.

## Adressa og telefonnummur

Boðanesheimið
Yviri við Strond 95
FO-100 Tórshavn

Telefon 302299 Gerandisdagar kl. 8.00-16.00

**Beinleiðis telefon nummur:**

| | |
|---|---|
| Strandarlon | 302503, 302504 |
| Strandarlon 2 (umlætting/rehab) | 302508, 302509 |
| Traðarlon 1 | 302511, 302517 |
| Traðarlon 2 | 302524, 302519 |
| Boðalon | 302518,302527, 302528, 302560,02564 |
| Virkisstovan | 213914 |
| Køkurin | 302563 |
| Vaskaríið | 302294 |

Tygum biðjast vinarligast nýta hesi telefon nummur, serliga tá samrøður snúgva seg um húsfólk.



## Ergoterapi

Ergoterapeutur veitir uppvenjing og stuðul um tygum hava trupulleikar við at virka í gerandisdegnum. Hann vegleiðir í nýtslu av ávísum hjálpitólum, sum kunnu lætta um gerandisdagin, við tí endamáli at betra um ella viðlíkahalda førleikastøðið hjá tygum.

## Fysioterapi

Tá tygum er flutt inn, kemur fysioterapeutur at gera eina metan av tygum, har mett verður um hvussu førleikastøðið í besta mun kann betrast, ella haldast við líka. Um møguligt kunnu tygum fáa holdvenjing saman við øðrum tvær ferðir um vikuna. Fysioterapeutur leggur venjingarætlan, og gevur einstaklinga venjing í avmarka tíðarskeið. Fysioterapeutur kann eisini ráðgeva um hjálpitól og flytingar

## Andalig tilboð

Gudstænasta er annanhvønn fríggjadag kl. 11.00, aðru hvørja ferð við altargangi. Prestar úr Havnini skiftast at hava gudstænastuna.
Brøðrasamkoman hevur møti annaðhvørt týskvøld kl. 19.00, tó við steðgi í summarfrítíðini.
Frelsunarherðurin hevur møti eitt mikukvøld hvønn mánað, tó við steðgi í summarfrítíðini.. Jehova vitjar einaferð um mánaðin í Virkisstovuni
Fastar avtalur eru ikki við aðrar trúarbólkar/samkomur, men serligar avtalur kunnu sjálvandi gerast um tygum ynskja tað.

## Vitjan/gestir

Heimið er altíð opið fyri vitjandi. Tygara búrúm er tygara privati bústaður. Tíverri hava vit ikki gestarúm til gestir at liggja nátt, men er sofa ella líknandi í búrúminum, er ikki óvanligt, at avvarðandi í serligum førum kunnu liggja nátt hjá tygum.

Høvuðsdyrnar lata upp kl. 06.00 og steingja kl. 00.15

## Virkisstova

Virkisstovan skipar fyri undirhúsi mikudag kl. 11 og mikudag kl. 14 er bindiklubbur.

Nakrar ferðir um árið verður skipað fyri eldradansi. Hetta skiftir millum røktarheimini og kostnaðurin er kr. 50,-

## Hugnaløtur

Heimið fær av og á tilboð um undirhald uttanífrá, tað kann vera sang- ella tónleikabólkar, sjónleikarar, fimleikarar, dansarar og líknandi, og taka vit altíð fegin ímóti og nýta høvið at samlast um slík tiltøk.

Árligt jólahald v/gudstænastu er fyri húsfólk, avvarðandi og starvsfólk.

Skipað verður fyri árligum húsfólkaútferðum í mai ella juni mánað. Hesum skipa eindirnar sjálvar fyri.

Skipað verður á hvørjum ári fyri ársveitslu

## Sjálvboðin

Vit hava tætt samstarv við Vitjanartænastuna hjá Reyðakrossi, og onnur sjávboðin, og er møguleiki hjá tygum, at fáa ein vitjanarvin..



## Boðanesheimið

Boðanesheimið læt upp í desember 2012.

Heimið er innrættað í tveimum hæddum, við trimum búeindum. Tvær røktareindir við 24 plássum hvør, ein demenseind við 16 plássum. Tilsamans eru 64 búpláss, herav eru tvey umlættingarpláss meðan 5 pláss eru til samdøgursrehabilitering.

Eitt felagshøli, Tórslon, er til størri tiltøk. Eisini er stórkøkur, virkisstova, venjingarhøli, frisør- og fótarøkt.

Møguleikar fyri rørslu, bæði innan- og uttandura, til gongu og í koyristóli eru sera góðir. Lyft er millum hæddirnar og ongar gáttir forða. Framvið vegginum eru hondlistar at halda sær í.

## Røkt og umsorgan

Røktarstarvsfólk og deildarleiðari hava ábyrgd av, at húsfólkið fær ta røkt og umsorgan, sum hann/hon hevur fyri neyðini. Røkt og umsorgan er við hugtakinum um eginumsorgan t.v.s. verður veitt, í mun til likamliga og sálarliga orku.

Tað er týdningarmikið, at ein varðveitur teir førleikar ein hevur, so sjálvvirði og sjálvræði ikki verður skert. Vit veita hjálp til sjálvhjálp, ið er mætasta endamálið í røkt og umsorgan.

Eru tygum óhjálpin, fáa tygum hjálp og stuðul við øllum.

## Innrættan/innflytan

**Búrúmið:**

· Búrúmið er 29 $m^2$,

· Baðirúmið er 7 $m^2$

· Á gólvinum er linoleum. Loyvt er ikki at leggja leys teppi á gólvið.

· Vindeygað er: breidd: 2,34 m, hædd: 1,33 m

· Vit mæla til, at búrúmið verður innrættað áðrenn flutt verður inn.

**Í búrúminum er:**

· Song við lampu

· Náttborð

· 3 skáp *(2 við hillum og 1 at hanga í).*

· Gardinstong/skinnari

· Seingjarklæði

· Handklæði

· Eygnalappar

Tríggjar av hillunum í skápinum eru til handklæði, seingjarklæði og annað, sum røktarstarvsfólkið fyllur upp.Vegna brunatrygd má onki leggjast oman á skápini.

Annað innbúgv til tygara búrúm skulu tygum hava við heimanífrá. Møblar, myndir og prýðislutir, sum pláss er fyri.

Heimið veitir ikki trygd fyri kostnaðarmiklum skreytlutum, smúkkum o.l. Ynskiligt er, at allir lutir verða væl merktir við navni ella nummari.

Heimið tryggjar ikki tygara innbúgv.



- Tannrøkt/tannviðgerð
- Vøra til persónligt reinføri s.s. sápa, tannkrem, rakiútgerð o.t.
- Klæðir og skógvar
- Ferðaútreiðlsur s.s útferðir, taxaflutning til og frá viðgerð og avtalum
- Trygging av egnum innbúgvi

## Avvarðandi

Starvsfólkið á Boðanesheiminum ynskir at hava gott samstarv við avvarðandi, sum altíð eru vælkomin at seta seg í samband við kontaktpersón ella starvsfólk á eindini. Væntað verður, at avvarðandi eisini hava ein aktivan leiklut, so sum at fylgja tygum til ørindi uttan fyri húsið, t.d.læknaørindi, til gudstænastu, á møti ella til jarðarferð.

Væntað verður eisini, at avvarðandi eru við til at skipa fyri hugnaløtum á eindunum.

Tað ber væl til hjá tygum at vitja familju og vinfólk, sum t.d. til føðingardagar, høgtíðir v.m. Avvarðandi verða biðin um at siga eindina frá í góðari tíð.

## Læknaviðurskifti

Tygum varðveita tygara egna lækna og limaskapin í Heilsutrygd. Limagjaldið verður trekt av pensiónini. Tygum rinda sjálv/ur heilivágin.
Avvarðandi fara við tygum til lækna.

## Peningalig viðurskifti

At búgva á eldrabústovni er javnsett við at búgva heima.

Allir fólkapensjónistar fáa fólkapensjón og samhaldsfasta eftirløn. Av hesum veitingum og aðrari inntøku verður rindað fyri vistarhald og tænastur á bústovnum.

Allir fólkapensjónistar, ið búgva á eldrabústovni - uttan mun til, um teir eru giftir ella stakir - fáa pensjónsupphædd sum stakir pensjónistar. Gjaldið er somuleiðis eins fyri øll, gift sum støk.

Øll gjalda somu upphædd fyri vistarhald (húsaleiga, olja, el, mat, reingerð, felags útreiðslur o.t.)Vistarhaldið er í løtuni kr 3.686,-. Upphæddin er ásett sambært kunngerð.

Øll rinda eitt minsta tænastugjald, ið m.a. fevnir um røkt og praktiska hjálp. Tey, ið hava aðra inntøku enn veitingar frá tí almenna, t.d. tænastumannaeftirløn, krígspensjón, rentuinntøku ella líknandi, rinda harumframt eitt eyka tænastugjald. Gjaldið er ásett í kunngerð og er treytað av, hvussu høg inntøkan er.

Minsta gjaldið er í løtuni kr. 2.000,- um mánaðin.

Umframt omanfyrinevndu gjøld rinda tygum sjálvur fyri persónligan tørv sum m.a. kann vera:

- Heilivágur
- Kropsborin hjálparráð s.s. brillur, hoyritól, handilstenn, stuðulssokkar v.m.
- Húðrøkt
- Fótarøkt
- Frisør



Búrúmið er fyrst og fremst eitt heim, har húsfólkið ræður. Havast skal í huga, at tað samstundis skal liva upp til tilmælingar í mun til arbeiðsumhvørvið hjá starvsfólki.

**Húsfólkið skal hava við:**

Gardinur - Vit mæla til eisini at hava myrkalegnings-gardinur.

· Innbúgv – Til fólk við demens, mæla vit til, at hava innbúgv, sum húsfólkið kennir aftur, er von/vanur við ella dámar.

· Veggjaprýði so sum myndir og málningar, tó ikki ov rúgvusmikið.

· tvey sett av dýnu og kodda, sum tolir at verða vaskað og turkað í maskinu.

· Hjálpitól, sum ein sjálvur hevur keypt.

**Í búrúminum ber til at hava:**

· Kuldaskáp

· Ketil

· Kaffimaskinu

· Teldu - Atgongd er til alnót

Búrúmið eigur verða møblerað, áðrenn tygum flyta inn.

Avvarðandi hava ábyrgd av at veggjaprýði verður hongt upp, í samráð við húsavørðunum, sum eisini hevur møguleika at útvega tilfar at heingja upp við.

Sjónvarpið skal helst standa á einum fóti, og ikki hangast upp.

Dømi um innrætting hjá húsfólki, sum ikki hevur tørv á koyristóli, lyft ella størri hjálpitólum




Dømi um innrætting hjá húsfólki, sum tørvar tvey hjálpar




## Heimavitjan

Áðrenn innflytan verður miðað eftir, at starvsfólk frá eindini, har tygum framyvir skulu búgva, koma á heimavitjan.
Avtalað verður, nær tygum flyta inn, og tosað verður um innbúgvið tygum skulu hava við, um klæðir, merking av klæðum og lutum o.a.

## Kontaktpersónsskipan

Á Boðanesheiminum nýta vit kontaktpersónsskipan.
Tá tygum flyta inn, verður upplýst, hvør kontaktpersónur tygara er.
Hendan skipanin lættir um samskifti við tygum og tygara avvarðandi.

## Reingerð

Búrúmið verður vaskað eina ferð um vikuna, ella eftir tørvi. Vaskifólk vaska gólv, náttborð, vindeygakarm og baðirúmið. Røktarstarvsfólk taka rusk úr búrúminum.
Tygum ella avvarðandi hava ábyrgd av at støva av egnar møblar og prýsðislutir umframt árliga høvuðreingerð í búrúminum.

## Klædnavask

Klæðir tygara verða vaskað á Boðanesheiminum. Klæðini mugu tola at verða maskinvaskað og maskinturkað.
Um klæðir, dúkar, teppir o.t. mugu til reinsingar, gjalda tygum sjálvur.Tygum skulu ikki merkja klæðini, men lata starvsfólki í eindini øll klæði til merkingar.